# SUMBIAR KOMMUNA

## STÝRISGERÐABÓK 2020

## 18.05.2020-05

| | |
|---|---|
| **Fundur nr. 05**<br>Tíð: **18.mai 2020, kl. 19:30**<br>Stað: À kommunuskrivstovuni. | Notis: |
| **10.01 – 07.02 – 20.03 – 17.04 – 18.05 – 26.06 – 04.09 – 16.10 – 13.11 – 13.12.** | <u>Møttir:</u><br>Eyðbjørn Thomsen<br>Frits Poulsen<br>Niclas Hentze<br>Brynleif Bech<br>Rúni Lisberg |

| | |
|---|---|
| **Mál nr. 01/05**<br>• **Umsókn um keyp av bók.** | • Samtykt var ikki at keypa hesa bók. |
| **Mál nr. 02/05**<br>• **Tilboð uppá reinsan av takinum á Sumbiar skúla.** | • Samtykt var at taka av tilboðnum nr 3. |
| **Mál nr. 03/05**<br>• **Tilboð frá Install uppá, at eftirhyggja okkara yvirvakingarskipan.** | • Taka ikki av í hesum førinum. |
| **Mál nr. 04/05**<br>• **Umsókn um byggiloyvið til garð.** | • Samtykt at geva loyvið til hesa umsókn. |
| **Mál nr. 05/05**<br>• **Fyrispurningur frá Eddi Bech viðv matr nr 131c.** | • Ein meiriluti á 3 stemmur søddu nei, og 1 stemma segði ja til at bjóða 20.000kr fyri hettar grundstykkið. Meirilutin segði nei, tí tað er eingin eftirspurningur, og kommunan hevur grundstykki í Lopra. B.B var ikki við í hesu viðgerð. |
| **Mál nr. 06/05**<br>• **Graviloyvið til NET til fiburkaðal.** | • Samtykt var at geva loyvið til hettar. Kommunan vil hava NET suður til at finna lettastu/bestu leið til hendan kaðal. |
| **Mál nr. 07/05**<br>• **Uppskot til neyst í Ònavík.** | • Einmælt samtykt at taka undir við hesum uppskotið til neyst í Lopra. Øll 8 neystini skula verða gjørd eftir hesu tegning, og Sumbiar kommuna hevur eftirlit við bygginigini. Eisini skal kommunan hava eftirlit við, tá hvør einstakur ger dráttin frá neystinum. |
| **Mál nr. 08/05**<br>• **Uppskot/tilboð til krana á kaiina í Lopra.** | • Samtykt var, at fáa fleiri tilboð inn. Inn eru komin 2 tilboð, og er munurin stórur ímillum tey. |

| | |
|---|---|
| **Til støðutakan / kunning.**<br>• **Skattainntøkurnar 2020.**<br>• **Kunning um uppruddan í Víkarbyrgi.**<br>• **Ymiskt.** | • Kunna var um skattainntøkurnar fyri 2020.<br>• Kunna var um hesa upprudding, og hvussu hettar er samskipa.<br>• Tosa var um kamping á krossinum. Kommunan setur seg í samband við leiðaran. Uppskot frá kommununi er, at hava kamping fríggjadag frá 19:00 til sunnukvøld kl 21:00. Og so í summarferðini. |

Fundurin lokin kl. 21:00

Eyðbjørn Thomsen    Frits Poulsen

Rúni Lisberg    Brynleif Bech    Niclas Hentze

SUMBIAR SÓKNAR KOMMUNA